## Rasismumál í Gøtu

Dimmalætting skrivar í dag, at ein hending kring vøllin í Sarpugerði nú verður fráboðað FSF sum rasismumál. Undir dystinum millum GÍ og B36 rópti ein áskoðari niðrandi rasistiskar viðmerkingar eftir Alex José dos Santos hjá B36. Trygdarfólk hjá GÍ fingu áskoðaran burtur, men sambært Dimmalætting verður málið nú sent FSF, sum skal taka støðu til, hvørt hetta skal fáa avleiðingar.



## Eriksson fær fleiri pengar

Nýggi eigarin av Manchester City, thailendski Thaksin Shinawatra, er als ikki liðugur at styrkja um felagið. Sambært enskum miðlum fer hann í næstum at handa Svenn-Goran Eriksson ikki minni enn 1,6 mia kr., sum venjarin kann nýta til spælarakeyp. Undan kappingarárinum keypti Manchester City spælarar fyri 450 mió kr., og málið hjá nýggja eigaranum er, at felagið skal vinna sær sæti í Champions League til komandi kappingarár.

EB/Streymur-NSÍ 0-1 (0-0):

# Gyltur bóltur til Runavíkar



*Hóast onkrir av møguleikunum vóru heilt stórir, so lá ein málleysur javnleikur leingi í luftini á Streymnesi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Við einum máli í yvirtíðini prógvaði NSÍ enn einaferð, at teir væl kunnu gerast heilt drúgvir í oddastríðnum**

*EB/S*

*NSÍ*

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóast vindurin til tíðir hevði hug at darva spælinum nakað, so gjørdist talan um ein av teimum heilt undirhaldandi fótbóltsdystunum, tá NSÍ var á vitjan á Streymnesi. Undirhaldandi, tí talan var um ein dyst, har báðir partar fóru á vøllin fyri at vinna. Og tó at bíðast skuldi í meira enn seks korter eftir einsamalla málinum, so høvdu báðir partar undan hesum misnýtt fyri seg.

Ikki tí at talan var um so øgiliga nógvar møguleikar. Tað nógva av spælinum gekk støðugt fyri seg á miðjum vølli, har Ronnie Samuelsen og Símun Eliasen høvdu nógvar og harðar nærdystir við Nenad Stankovic og Sjúrð Jacobsen.

Vertirnir høvdu vindin undan fyri steðgin, og tað tóktist eisini geva teimum fyrimun. Støðugt reikandi Hans Pauli Samuelsen og Sorin Anghel vóru fleiri ferðir um reppið at skræða gestaverjuna heilt sundur, men Pól Thorsteinsson, Óli Hansen, Johan Troest Davidsen og Einar Hansen megnaðu støðugt at standa ímóti.

Og í hinum endanum royndu gestirnir at dúva upp á kontra. Serliga tóktist Hjalgrím Elttør væl upplagdur, tá hann royndi at bjóða av, men størsta møguleikan av øllum fekk Christian Høgni Jacobsen, tá hann brádliga stóð púrasta blankur. Tað eydnaðist honum eisini at taka innleggið frá Pól Thorsteinssyni niður, men skotið varð brent beint í krovið á René Tórgarð. Og hetta var líka sum startskotið hjá EB/Streymi. Fyrst langaði Hanus Eliasen bóltin á undirsíðuna av tvørtrævnum, áðrenn Sorin Anghel stútaði returin uppum. Og løtu seinni fekk ein sitandi Arnbjørn Hansen akkurát ikki nóg mikið av ferð á bóltin eftir eina trídupulta roynd frá EB/Streymi, og so kundi Pól rudda burtur á sjálvari málstrikuni.

### Seigir runavíkingar

NSÍ hevur fleiri ferðir í ár koppað dystunum rætta vegin í evstu løtu. Ikki minst man hetta vera, tí liðið í ár er kropsliga sterkari enn tey flestu, og teir nýttu eisini hendan fyrimunin á Streymnesi.

Stóran part av seinna hálvleiki var talan um massivt trýst móti EB/Streymamálinum, og tá Sorin Anghel keikti sær fótin og noyddist av vøllinum, mistu vertirnir týdningarmesta kontra-vápnið.

Hjalgrím Elttør hóreiggjaði sær alt meira í vinstra borðið, sum dysturin leið, og ferð eftir ferð mest sum skræddi hann verjuna hjá EB/Streymi sundur. Og tað var eisini hann, sum var upphavsmaður til størsta møguleikan av øllum, men Jónhard Fredriksberg fekk ikki hildið javnvágini, tá hann hevði tikið bóltin inn um René Tórgarð, og so tóktist alt skula enda málleyst.

At B36 hevði skorað í Gøtu fræ ttu viðhaldsfólkini hjá NSÍ sjálvandi, men rópini frá teimum tóktust tó vera til fánýtis, áðrenn sigursmálið brádliga kom. Og tað mest sum burtur úr ongum.

Nenad Stankovic kipti bóltin inn aftur í brotsteigin eftir áhaldandi NSÍ-trýst. Og hóast vertirnir vóru í øðini, tí teir mettu fríspark verða framt móti René Tórgarð, so hjálpti hetta einki, tá bólturin spakuliga sigldi yvir í handara síðunet. Og so gjørdi tað ikki dagin hjá vertunum betri, at Hans Pauli Samuelsen í seinastu sekundunum fekk beinleiðis reytt fyri harða stempling móti Pól.

Frustratiónirnar vóru sjónligar, og tapið ber heilt víst við sær, at EB/Streymur nú er endaliga úti úr gulldystinum. Hjá NSÍ livir vónin um fyrsta FM-gullið framvegis væl og virðiliga. Á pappírinum var dystinum sunnudagin kanska truplasta uppgávan av øllum teimum, sum eru eftir á kappingarskránni, og tí var fagnaðurin skilliga stórur eftir sigurin.

## Ein dyst í senn

Hóast tað bert eru fimtan stig eftir at spæla um, so vilja teir í NSÍ als ikki hoyra nakað tos um eitt møguligt FM-heitið.

- Hjá okkum er støðan tann sama. Vit hava alt ár roynt at hyggja uppeftir, og vit taka ein dyst í senn. Sjálvandi var sigurin í dag kærkomin, men longu komandi sunnudag er talan um nýggja uppgávu. Og tað er fyrst og fremst hesa, sum vit fyrireika okkum til, segði Óli Hansen, liðformaður hjá NSÍ.

Spurdur, hvat tað er, sum í ár hevur givið NSÍ tað eyka drive, sum skal til, tá dystir í fleiri førum eru avgjørdir í evstu løtu, sigur Óli, at hann heldur teir vera væl fyri í ár.

- Tað vísir seg, sum orka vit at halda trýstinum gjøgnum ein heilan dyst, og tá tað so eisini vísir seg at hepnast fleiri ferðir, verður trúgvin upp á møguleikan sjálvandi størri, heldur Óli.

## Dómarin skuldi fingið leikbann

Ronnie Samuelsen var í øðini, tá Lars Müller hevði bríkslað fyri seinastu ferð á Streymnesi.

- Hatta fullkomuliga oyðileggur dystin fyri okkara viðkomandi. Fyrst fáa teir eitt mál forerandi, og so fær Hans Pauli eisini reytt kort. Tað kostar so leikbann til hansara, og tað svíða vit fyri. Men mín meining er so, at ein slíkur dómari sjálvur skuldi fingið leikbann í fleiri dagar, segði Ronnie.